# Trygdin hjá børnum sett í hásætið

**Vestmanna kommuna fer nú at seta sterkt hegn kring allan barnagarðin í bygdini. Ein partur er longu gjørdur, meðan restin verður gjørt í vár**

BARNAANSING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Nýggi barnagarðurin í Vestmanna liggur vakurt fyri. Við síðuna av barnagarðinum liggur djúp gjógv, men hegnað er framvið. Nú skal hegnast betri og tryggari kring allan barnagarðin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Tað var eitt stórt framstig innan barnaansingina, tá vestmenningar fyrst í árinum kundu taka tann nýggja barnagarðin í nýtslu.

Nýggi barnagarðurin við heitinum "Gjáarlon", ið liggur ovarlaga í bygdini, er góðkendur til 84 børn. Her er bæði talan um børn í vøggustovu og í barnagarði.

Hetta var samstundis tann fyrsti barnagarðurin, ið varð góðkendur av almennu eftirlitsstovnunum. Har inni finst tí alt, sum kann gera dagin góðan og innihaldsríkan fyri vestmannabørn.

Uttanfyri er tó enn eitt og annað eftir at gera. Millum tingini, ið ein fer undir í næstum er at leggja asfalt á spæliplássið.

Men tað størra málið í hesum samband má tó sigast at vera sjálv innhegningin av barnagarðinum, sum liggur beint við eina stóra gjógv.

– Hetta málið verður eisini loyst nú, sigur Karl A. Olsen, borgarstjóri í stuttari viðmerking við Sosialin.

### Sterkt hegn

Á fundi í bygdarráðnum herfyri varð júst hetta málið til viðgerðar.

Í ætlanini skulu tvey arbeiðir gerast: Í fyrsta lagi skal gerast ein stuðulsmúrur niðan móti vegnum, soleiðis at børnini ikki á nakran hátt kunnu fara uppeftir hesum beninum.

Í øðrum lagi er so ætlanin at gera eitt gott og sterkt hegn kring allan barnagarðin. Ein hevur longu sett upp eitt slíkt hegn í niðaru síðu av garðinum, meðan ein í ovaru síðuni fyribils hevur sett upp eitt minni hegn.

Tá málið um stuðulsmúrin var fyri á fundinum í bygdarráðnum lá eisini í tí, at ein ætlar at seta upp tað sama sterka hegnið kring um allan barnagarðin.

Bygdarráðið samtykti einmælt at játta 300.000 kr. til hetta arbeiðið, sum verður fíggjað við peningi av fýra ymiskum konto'um hjá bygdarráðnum.

– Vit hava verið eitt sindur forðaðir av veðri. Men ætlanin er at byrja sum skjótast við arbeiðinum, soleiðis at tað kann verða liðugt í vár, sigur borgarstjórin, Karl A. Olsen.

### Málið rokkið

Tá barnagarðurin Gjáarlon gjørdist veruleiki, kundi ein siga, at eitt av málunum hjá Kvinnulistanum í Vestmanna var rokkið.

Men tey børnini, sum hava tørv á dagrøkt, hava kortini ikki bert henda nýggja barnagarðin at fara í. Ein útibarnagarður er eisini í Vestmanna.

Hesin kallast Látipípan, og kann hýsa børnum úr 5 árum upp í 7 ár, og í frítíðaransingini frá 1. til 3. flokk.

Á bygdarráðsfundinum í farnu viku varð eisini eitt mál fyri henda barnagarðin til umrøðu. Tað var ein umsókn frá leiðaranum, Maluni Stórá um loyvi at seta eitt starvsfólk aftrat.

Hetta málið var fyrst til viðgerð í fíggjarnevndini, sum í fyrstu syftu mælti til at játta eitt starvsfólk frá 1. mars til 30. juni. Til stovnurin letur upp eftir summarfrítíðina, fer trivnaðarnevndin at kanna tørvin á plássum í frítíðaransingini. Hetta tilmælið varð einmælt samtykt.

# Landsvegurin nærkast Strondum

**Arbeiðið við landsvegnum millum Skála og Strendur gongur væl. Um stutta tíð verður næsta byggistig frá Hulki og norður móti Prestá boðið út**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Arbeitt verður ovarlaga við vegagerðini, soleiðis at ferðslan í framtíðini ikki skal ganga gjøgnum bygdina*

Vegagerðin á vestara armi á Skálafjørðinum er ein landsvegur, sum gongur frá skákvegnum oman til bygdina á Skála og út móti Hulki á Strondum.

Teir eru í løtuni í ferð við at gera ein grovplaneraðan veg frá Gjógvará til Skálagarðsá og eina brúgv um Prestá.

Fyrr í hesum mánaðinum høvdu teir grivið nærri 700 metrum, og skuldi næsta stig verða at spreingja fyri brúnni um Prestá og síðani gera brúnna.

Tað er Byggitek sum stendur sum arbeiðstakari av arbeiðinum, har ein ætlandi verður liðugur við 3. byggistig tíðliga í summar.

– Ætlanin fyri, nær samlaða arbeiðið verður liðugt, veldst alt um játtanirnar á komandi løgtingsfíggjarlógum, skrivar heimasíðan hjá Landsverki. Kostnaðurin av samlaðu vegagerðini er mettur til slakar 52 mió. kr. Kostnaðurin av 3. byggistigi er mettur til 7,9 mió. kr.

## Býráðið keypt Müllers pakkhús

**HAVN:** Tórshavnar býráð hevur nú keypt Müllers pakkhús fyri 1,5 mió. kr.

Málið var fyri á fundi í havnanevndini í september mánaði í fjør. Nevndin samtykti tá at kommunan skuldi yvirtaka henda søguliga bygningin, sum sambært tingbókini er 376 fermetrar stórur.

Á fundi í fíggjarnevndini 9. februar varð samtykt at taka undir við havnanevndini, soleiðis at kommunan kundi yvirtaka ognina fyri 1,5 mió. kr.

Tá býráðið hevði málið til viðgerð í farnu viku, varð tað samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

Á sama fundi varð eisini samtykt at keypa tað grótlaðaða neystið nærhendis. Hetta neystið er 69 fermetrar til støddar, og varð yvirtikið fyri 150.000 kr.

**sb.**

## Filadelfia varpar ljós á hjúnabandið

**SKEIÐ:** Vikuskiftið 15. til 17. apríl skipar samkoman "Filadelfia" fyri eini hjúnabandslegu á Hotel Føroyum.

Tað hevur eydnast at fáa ein av góðu undirvísarunum í Skandinavia, norðmannin Eivind Frøen sum undirvísara á skeiðnum.

Øll hjún eru vælkomin á legu. Málið er at luttakarapørini fara styrkt og endurnýggjaði heimaftur. Í dag er nógvur ágangur á hjúnabandið, og ein kann ikki síggja burtur frá tí veruleika, at mong trúgvandi kundu havt eitt betri hjúnalag.

– Trupulleikin er, at vit skammast at tosa um slík viðurskifti. Ístaðin fyri at leita upp hjálp, so endar tað við einum braki, og hjúnalagið sindrast, meðan børnini standa sum teir stóru taparanir.

Fyri at bjarga verandi og komandi hjúnabondum kunnu tvey ting gerast: Í fyrsta lagi at seta ígongd hjálpartænastur fyri hjún, sum hava trupulleikar, og í øðrum lagi at reisa upp fyribyrgjandi tiltøk, sum kunnu hjálpa hjúnum, áðrenn tey koma í trupulleikar.

Tað er í samband við hetta seinna, at leiðslan í Filadelfia hevur gjørt av at halda hesa hjúnabandsleguna í apríl mánaði.

**sb.**